# Rokmskaparfólk til Statoil Føroyar




Statoil Føroyar søkir eftir einum dugnaligum roknskaparfólki.

**Starvið:**
Sum partur av roknskapardeildini kemur tú at arbeiða við roknskaparligu uppgávunum hjá Statoil Føroyar. Arbeiðið umfatar m.a:

- bókingar / avstemmingar
- mánaðarroknskapir
- konsernroknskapir
- likvidetsstýring
- fíggjarligar greiningar
- aðrar skrivstovuuppgávur

Á roknskapardeildini starvast 5 fólk. Tú hevur tilvísing til roknskaparleiðaran og arbeiðsstaðið verður á høvuðsdeildini á Óðinshædd í Tórshavn.

**Umsøkjarin :**
Fyri at kunna røkja starvið best møguligt rokna vit við, at:

- tú hevur útbúgving innan økið t.d. HA, HD (R), grannskoðari alla líknandi.
- ert fyrikomandi
- hevur góð samstarvsevnir
- er tænastusinnað/ur
- kann arbeiða sjálvstøðugt

**Vit bjóða:**
Eitt avbjóðandi starv við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

Møguleikar eru fyri at luttaka á skeiðum. Lønin verður sett eftur royndum og útbúgving. Eftirlønar-trygging fylgir við starvinum.

**Umsóknir:**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Sverra Kallsberg, fíggjarleiðara á tlf 21 28 50.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 31. juli og skulu sendast til:

P/F Mentir
(Statoil Føroyar)
Postboks 3098
110 Tórshavn
frámerki "Roknskaparfólk"
ella sendast til ska@statoil.fo

Allir umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

sansir.fo

Endamálið hjá Statoi Føroyar er at veita brúkarunum kring Føroyar oljuúrdráttir og aðrar vørur. Fyri Statoil arbeiða umleið 150 fólk.
Vit stremba eftir at veita bestu góðsku og tænastu, eins og umhvørvisábyrgd á øllum økjum er eitt av okkara fremstu málum.

STATOIL
*- fyri viðskiftafólk okkara*




Tórshavnar kommuna fer nú undir at rudda upp á øllum almennum vegum og økjum, sum kommunan ræður yvir.

Talan er um akfør, bátar, reiðskap, amboð og tílíkt, sum fólk hevur sett frá sær, men sum einki frámerki hevur um, hvør eigarin er.

Heitt verður á øll, sum hava slíkar lutir standandi á kommunalum økjum, um at beina teir burtur sum skjótast og innan eina viku.

Lutir, sum ikki eru burturbeindir í seinasta lagi 7. juli 2008, verða burturbeindir av Tórshavnar kommunu uttan aðra ávaring.

Tórshavnar kommuna tekur samstundis fyrivarni fyri at krevja allar útreiðslur í hesum sambandi endurgoldnar frá eigaranum.

Heitt verður eisini á øll, sum hava slíkar lutir á privatum økjum, og hesir kunnu metast sum órudd, um at beina teir burtur sum skjótast.

Tórshavnar kommuna